


*Í løtuni starvast hann á Dagstovninum við Landavegin, har hann trívist væl. Ætlanin er seinni at gerast politistur ella pilotur*

upplýst hvør mamman var, og hvar hon búði. Pápin var ókendur. Føroysku foreldrini, Erla og Sofus Borðoy, eru eisini spent upp á túrin hjá Yohan, hóast tey vita hvussu ófriðarligt har kann vera. Tey hava ikki vitjað Kolumbia síðan tey vóru eftir Yohan fyri 17 árum síðan. Á jólum skal tað broytast. Tá fara tey til Kolumbia at vitja aftur.

Tað er sjálvandi ringt at fara, men hetta vil eg. Eg havi tosað við fleiri, sum hava verið og lisið umvegis AFS, so seg kenni meg rímiliga tryggan.

Tað kostar umleið 45.000 krónur at fara á eina slíka ferð, tá alt er íroknað. Tá verður syrgt fyri skúlagongd, bústaði og at Yohan fær eitt arbeiði, tá hann kemur til Bogotá.

## 500.000 gøtubørn hvønn dag

Yohan fær ikki tørv á býli frá AFS, tá hann fer til Kolumbia, tí familjan hjá honum hevði ein AFS næming búgvandi í 1996, sum tey hava hildið samband við. Hon eitur Caroline, og hjá henni sleppur Yohan at búgva hjá. Ein treyt fyri at lesa umvegis AFS skipanin og at fáa arbeiði gjøgnum Community Service, er at ein er millum 18-28 ár, og at ein skal vera virkin og fúsur at gera hjálpararbeiði. Arbeiði fær Yohan, og hevur hann hevur meldað seg til at gera hjálpararbeiði við børnum, meðan hann er har.

Tað eitur Community Service, og er vælgerandi arbeiði innan tað sosiala, mentanarliga, humanitera og heilsuverki. Eg havi so valt at arbeiða við gøtubørnum.

Bogotá er ein stórur og modernaður býur við sínum 11 milliónum íbúgvum. Stórur munur er á høgum og lágum. Har finnast sera múgvandi fólk, men samstundis eru á leið 500.000 børn at finna í gøtunum hvønn dag í Bogota.

Landið er rættiliga bíligt at búgva í, tí útflutningurin av vørum til londini rundan um er stórur í Kolumbia. Bogotá býur liggur á 2600 metra hædd, og er luftin tí tunn, og er býurin umgirdur av fjøllum og junglum, greiðir Yohan frá.

Sjálvur er hann føddur í Ramadios, men búði eitt skifti í Yolombo hjá eini pleygufamilju har.

## Ferðin til hitt heimið

Yohan Borðoy hevur í vetur lært seg spanskt á kvøldskúla, so hann ikki er heilt ófyrireikaður til ferðina. Hann gjørdist fyri stuttum limur í Ættleiðingarfelagnum. Hann var stigtakarin til tiltakið, sum var 2. hvítusunnukvøld, tá hann savnaði ung ættleidd í Miðlahúsinum. Eitt tiltak, sum hann er sera fegin um skuldi eydnast so væl. Ung ættleidd í Føroyum savnaðust í stórum tali, veður og lag á ungu fólkunum var gott, og avgjørt var at skipa fyri einum líknandi tiltaki afturat. Fyri hann er tað av týdningi at hava eitt felag sum Ættleiðingarfelagið.

Hesa tíðina komandi ár kann hann ivaleyst fortelja eina fantastiska søgu, um sína ferð til Kolumbia fyri hinum limunum í Ættleiðingarfelagnum.

Hendan ferðin er ein gamal dreymur. Eg havi altíð havt tað gott í Føroyum. Men eg vil sleppa burtur í eitt ár. Eg vil læra at kenna eina heilt aðra mentan, læra mítt móðurmál og royna mínar egnu avmarkingar. Suðuramerika er jú ein heilt annar heimur, sigur Yohan Borðoy.

Fyri fyrst er talan um ein einvegis ferðaseðil hjá Yohan. Hann hevur ein dreym um antin at gerast løgreglufólk ella pilotur tá hann eina ferð kemur aftur. Men fyrst skal Kolumbia upplivast – hansara fyrsta heim.